From: Thormund Johannesen <thj@knudehansen.com>
Sent: fríggjadagur, 1. januar 2021 17:27
To: Hilmar Eliassen <he@ssl.fo>
Cc: Jóhan Petur Abrahamsen <jpa@ssl.fo>; Marni Olsen <MAO@knudehansen.com>
Subject: FW: Endurnýggjan av strandfaraflota

Hey Hilmar og gott nýggjár

Síðani eg sendi niðanfyristandandi teldubræv, hevur Strandferðslan, og kanska serliga tú, sum stjóri, verið nóg frammi í fjølmiðlunum.
Tað er gott, at miðlanir seta fokus á Strandferðsluna, og serliga, at Strandferðslan sjálv sleppur til orðanna, tí tað er vegurin fram, at fáa almenna og ikki minst politiska fatan fyri , at her skulu íløgur gerast.
Eg havi tí ikki kunna latið verið við at hugsa um Strandferðsluna hesar dagarnar:
Vit, KEH, løgdu longu í 2012, saman við Strandferðsluni, eitt uppskot fram um eina 2 + 2 loysn viðvíkjandi nýggjum ferjum.
Í framløgu á temadegi hjá SSL í 2017 var (2 + 2)-ætlanin eitt sindur tillaga, tí tørvur helst fór at blíva á eini triðju av teim minnu ferjunum, og sostatt kanska 2 + 3.

Í seinastuni hava vit hoyrt at suðuroyarleiðini eisini hevur hevur brúk fyri tillaging.
Eg kann tí ikki lata vera við at koma við einum hugskoti:
Um farið verður undir at gera atløgupláss til Teistan á Sandi, kann hann, tá ið sandoyartunnilin verður liðugur, setast í sigling millum Krambatanga og Sand, ein leið upp á 20 sjómíl.
Teistin er bygdur til B-øki, men er avmarkaður í mun til signifikanta ælduhædd yvir 3 metrar, síðan nýggju vatn á dekk krøvini frá 2013.
Hetta ger seg tó bert galdandi, tá ið hann er tungt lastaður, og tað vil siga við stórum bilum.
Um hann bara flytur ferðafólk og persónbilar, er støðan ein onnur og betri.
Siga vit, at Teistin klárar 5 dupulttúrar um dagin millum Sand og Tvøroyri, kann hann flyta upp til 155 persónbilar hvønn vegin hvønn dag, og tað eigur at lætta væl um hjá Smyrli.
Av ferðafólki kann hann flyta upp til 1300 um dagin á sumri og upp til 820 um dagin á vetri.
Tað er kanska ikki har trupulleikin hjá Smyrli er størstur, men tað hevði tó nærum trífalda títtleikan á suðuroyarleiðini, og tað hevði verið stórt framstig.


Møguleikar eru eisini fyri kapasitetsøking á hesi leið:

1. Teistin kann leingjast, so hann tekur enn fleiri bilar og ferðafólk.
2. Ferjulega kann gerast í Hvalba, sum styttir leiðina niður í 15 sjómíl og harvið gevur møguleika fyri fleiri túrum.

Hugsaði, at hetta kundi verið spennandi hugskot til tess at menna suðuroyarleiðina fram til at tunnilin kemur um eini 10 ár ella gott tað.

Tað eigur at verða hugsað frameftir, heldur enn at koma við hovsaloysnum, tá ið støðan er blivin akutt.

v/Thormund



From: Thormund Johannesen
Sent: 29. december 2020 14:55
To: Hilmar Eliassen <he@ssl.fo>
Cc: Jóhan Petur Abrahamsen <jpa@ssl.fo>; Marni Olsen <MAO@knudehansen.com>
Subject: Endurnýggjan av strandfaraflota

Hey Hilmar

Víst verður til stutt prát úti á farstøðini Tollaksmessudag.

Knud E. Hansen hevur havt ikki so lítið við Strandferðsluna at gørt gjøgnum árini.
Gomlu Rituna, sum gamla Ternan á sinni sigldi á, so hon sakk og gjørdist vrak, hevði KEH teknað.
Núverandi Ritu, sum í komandi ári verður 50 ár, teknaði KEH eisini.
Og nýggju nólsoyarferjuna, sum tó bleiv tikin av skrá, eftir at tilboðini vóru komin inn, teknaði føroyska deildin hjá KEH.

Mols-ferjurnar, sum blivu til Smyril og Teistin teknaði KEH og somuleiðis núverandi Smyril.
KEH var eisini við í prosjekteringini av tí Smyrli, sum var smíðaður á Tórshavnar Skipasmiðju og latin í 1968.

Vist nokk einasta strandfaraskipið, har Strandferðslan sjálv hevur verið við í allari prosjekteringstilgongdini, var Teistin.

Hetta var fyrsta skipið í danska kongaríkinum, sum varð smíðað eftir nýggju reglunum sambært EU-direktivi, og sum í dag eru galdandi.
Prosjektleiðari og fremsti verkfrøðingur í tí prosjektinum vóru vit báðir, sum nú starvast í føroysku deildini hjá KEH.

Kanska er tað relevant at nevna, nú talan er um føroyskar ferjur, at KEH eisini hevur teknað bæði gomlu og núverandi Norrønu. Núverandi Norrøna bleiv tó breiðkað og annars broytt nakað í mun til upprunaligu tekningarnar frá KEH.

Í 2012 gjørdi KEH Føroya deild eina frágreiðing fyri Strandferðsluna viðvíkjandi endurnýggjan av flotanum, sí viðfesta "Bræv til SSL viðvíkjandi løguætlan".
Henda frágreiðing er meira enn einaferð tikin fram aftur, tá ið talan hevur verið um endurnýggjan.

Í 2017 gjørdi KEH eina frágreiðing um flotan hjá Strandferðsluni, sí viðfestu "Frágreiðing 1".
Innihaldið í hesari frágreiðing hevur verið brúkt aftur í samferðsluætlan hjá Landsverki.

Í 2018 hevði undirritaði eina framløgu á temadegi, sum Strandferðslan skipaði fyri í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, sí viðfesta "Fyrilestur um strandfaraflota".

Einaferð, meðan Bogi Mortensen var stjóri á Strandferðsluni, bleiv tosað um at gera rammuavtalu millum Strandferðsluna og KEH-Føroya deild.
KEH hevur slíkar rammuavtalur við donsk og svensk reiðarí, men tað bleiv tó ikki til nakað, ta ferðina.

Nú støðan er vorðin akutt, eru tað helst nógvir, bæði politikarar, kommunalpolitikarar og vinnulívsmenn, sum koma við góðum ráðum um hvat og hvussu.
Allir hava tó helst sína duldu dagsskrá, nú landsstýrismaðurin leggur upp til, at bæði alment, kommunalt og privat kunnu sleppa upp í part.
Ongantíð so nógv sum nú, hevur Strandferðslan tí brúk fyri óheftari skipstekniskari ráðgeving, soleiðis at hon ikki verður tikin av ræði av privatum, kommunalu og almennum áhugamálum.
KEH hevur, sum omanfyri víst á, altíð verið til reiðar ósjálvsøkið at ráðgivið Strandferðsluni, tá ið brúk hevur verið fyri tí, uttan tó at hava verið ágangandi, fyri at sleppa í gongd við skipaprosjektering.

Vit vilja bjóða okkum til, at standa Strandferðsluni við lið og ráðgeva í komandi tíðum, soleiðis at Strandferðslan sjálv, í størst møguligan mun, ræður fyri tí sum fer at henda í sambandi við endurnýggjan av flotanum.
Tað snýr seg ikki einans um skipstekniskar loysnir, men kanska eisini at kunna svara aftur og andøva upp ímóti "smartum" loysnum, sum óivað fara at koma ymsastaðni frá.

Ein rammuavtala millum Strandferðsluna og KEH, har KEH bindur seg at veita Strandferðsluni skipstekniska ráðgeving fyri serligar sømdir, viðvíkjandi prísi og raðfesting, kundi kanska verið eitt hugskot.
Ein møguleiki er at veita ráðgeving til serliga lagaligan prís, tá ið lítil fíggjarorka er til tess, fyri síðani at kunna taka nakað innaftur, tá ið fígging er fingin til okkurt prosjekt.

Sum nevnt á fundinum á Farstøðini Tollaksmessudag, so eru vit til reiðar at taka ein fund um hesi viðurskifti, so skjótt tað liggur fyri hjá tykkum.

Vinarliga / Best regards

THORMUND JOHANNESEN
Master Mariner & Senior Naval Architect

Mobile +298 229 226
Mail thj@knudehansen.com
Skype thj@knudehansen.com
www.knudehansen.com
KNUD E. HANSEN
Vestara Bryggja 15
3. hædd
FO-100 Tórshavn, Føroyar